

an, trivnaður og nýhugsan skulu festa røtur í Føroyum. Um fræini, sum koma við vindinum uttanífrá, skulu festa seg í føroysku moldini.

Tí var tað ikki júst flytifuglurin tjaldrið, sum bardist ímóti ravnunum og vardi smáfuglin? Í Føroyum kláraði smáfuglurin nevniliga ikki sjálvur at kappa høvdið av autoritetunum, og tí mátti hann hava flytifuglin tjaldrið at hjálpa sær.

Men hyggja vit í føroysk bløð í dag, sær tað út til, at tað er blivið ógvuliga vanligt at leggjast á smáfuglin í samfelagnum, nevniliga minnilutarnar í Føroyum, sum als ikki hava rættindi sum eru púra vanlig og viðurkend t.d. her í Danmark.

Í Føroyum er tað nevniliga sera lætt antin við dulnevndum lesarabrøvum ella við einum fundamentalistiskum kristindómi - ið ofta tosar meira um persónliga frelsu enn næstrakærleika - at koma framat og leggja eftir øðrvísi hugsandi og køva alt sum eitur tolsemi.

Hendan intoleransan kann tá - eins og lesull um fuglabein - rekast upp í alt føroyskt kjak, og kann vera sera torfør at koma seg burtur úr aftur.

Og tá er tað líkamikið um tú ert samkyndur, fráskyldur prestur, formaður í búskaparráðnum ella okkurt heilt annað.

Ja, enntá politikarar kunnu finna upp á at siga, at hetta er ov galið, men sjálvi leggja tey ikki uppskot fram um at broyta hetta. Men tað kann eisini vera so galið, at minnilutar sjálvir gerast skjótiskivur hjá politikarum og risikera at verða kallaðir landasvíkjarar.

Og her hugsi eg eg sjálvandi aftur um fyrrverandi formannin í búskaparráðnum, sum í fjør bleiv hartaður í fleiri vikur, av tí almenna áganginum.

Hvør fuglur *má* sleppa at syngja við sínum nevi, tí sum Jørn Astrup Hansen tók til, tá ágangurin frá politakarunum ímóti einum av hesum fáu embætisfólkunum, sum tók lut í orðaskftinum, bleiv alt ov harður:

*"Drepur tú ein sangfugl, fer kórið at ljóða falskt!"*

Sagt av einum bankastjóra, sum eins og tjaldrið hevur roynt sítt flog aðrastaðni, áðrenn hann lendi í Føroyum, og kom sum eitt frískt lot inn í ta føroysku kjakmentanina.

Tí sjálvt um tað kann vera skjótt at missa pippið, tá hvør fuglur syngur við sínum nevi, so hava vit hava nevniliga øll skyldu til eins og tjaldrið ikki at vera nalvaskoðandi og heimføðislig, men heldur at verja smáfuglin í samfelagnum, hvørs veingir eru lættari at skerja, enn hjá teimum stóru fuglunum.

Lat okkum øll tí minnast til tað næstu ferð vit eins og flytifuglarnir venda nevinum aftur ímóti Føroyum: At hugsa um minnilutarnar, og gera tað hugaligari hjá teimum og sostatt okkum øllum at búgva í Føroyum. Ikki fyrr enn tá kunnu vit av røttum syngja fyrsta ørindi av tjaldurssanginum hjá Jákupi Dahl:

**Tjaldur ver vælkomið til
okkum heim,
Frá ókendum fjarskotnum
londum!
Tú bert okkum boð um ein
ljósari dag
At nú er brátt summa
í hondum.**

Ikki fyrr enn tað er liviligt hjá øllum, verður rættiligt summar í Føroyum, og ikki fyrr enn tá kunnu vit kalla okkum - *um ikki eitt framkomið land* - so eina framkomna *tjóð*.

Takk fyri!

# Nærum helvtin av atgongumerkjunum longu seld




TÍÐINDASKRIV

Sangleikurin Grease, sum ungdómsbólkurin í skúlanum hjá Havnar Sjónleikarafelagi setir upp, gongur við strúkandi ferð framá. Stórur eftirspurningur er eftir at síggja henda vælumtóka sangleikin. Frumframførslan verður 6. apríl kl. 19, og so verður spælt mikudag til sunnudag í tvær vikur. Longu nú eru nærum helvtin av atgongumerkjunum seld.

Nú eru 10 ár liðin síðan Grease seinast bleiv sýndur í Sjónleikarhúsinum og tey ungu, ið er farnir í holt við leikin saman við Hedvig Westerlund-Kapnas, hava flest øll gingið fleiri ár til leiklist í Sjónleikarhúsinum. Nakrir nýggir leikarar eru eisini við, men hesir hava allir verið virknir sum tónleikarar áður. Ein vaksin leikari er við, annars eru allir millum 15 og 17 ár.

Við í Grease er eisini vælumtókti tónleikarbólkurin Paradox, sum fyri stuttum fyri fyrstu ferð tóku lut í Prix Føroyum. Teir eru bara 15-16 ára gamlir og fingið framúr undirtøku, men komu kortini ikki víðari. Allir sangirnir í Grease verða framførdir "live" og á føroyskum.

Ungu leikarunum dámar sera væl Grease-leikin, hóast filmurin, sum flest øll hava sæð, ikki samsvarar heilt við okkara handrit. Tað er gott at sleppa at royna seg á ymiskan hátt, og royna ymiskir hættir at framføra boðskapin, moralin í leikinum. Bólkurin hevur roynt nógv ymisk sløg av sjónleiki áður, men hetta verður fyrsti sangleikur, hann setur upp. Arbeitt verður ofta við dupultum leiklutum, tí á tann hátt kunnu leikararnar læra av at síggja tað, sum hini við sama leikluti gera øðrvísi, og saman geva øllum leiklutunum í leikinum eina sterka persónligheit.

Fyri stuttum vóru fleiri úr sama bólki í sjónleikarskúlanum í Noregi á Stord Teater Festival og framførdu "HEIM" eftir Ludmilu Razumovskaya, og fingu framúr góða undirtøku.

Høvuðsstuðul hjá leikinum er Føroya Banki, og tað er teimun, eins og Jólamerkjagrunninum at takka, at tey ungu hava fingið møguleika at fara undir eina so stóra verkætlan.

Køna vegleiðing hava tey fingið til dans frá Rannvá Øssursdóttir, til pallsmíð frá Jóanesi Andreasen, til ljós og ljóð frá Hjalmari Holm við manning, Theodor og Ragnar, og Stamen Stanchev hevur verið tónleikaráðgevi. Nógv onnur hava eisini veitt eina hjálpandi hond.